Føroya Kærustovnur

Almanna- og heilsumálaráðið
Kopargøta 1
100 Tórshavn

Stílað: Bjørgfríð Ludvig, aðalstjóri

Tórshavn, 27.01.2026
J.Nr.: 26/02304 (at tilskila í svari)
Viðgjørt: AH/-

Hoyringsviðmerkingar – uppskot til løgtingslóg um leigustuðul

Í sambandi við at uppskot til løgtingslóg um leigustuðul á heimasíðuni hjá Almanna- og heilsumálaráðnum stendur at vera til ummælis, loyva vit okkum at koma við okkara viðmerkingum til uppskotið.

Okkara viðmerkingar snúgva seg um § 12 í uppskotinum, sum sigur, at avgerðir hjá Almannaverkinum eftir løgtingslóg um leigustuðul kunnu kærast til Føroya Kærustovn.

Eftir uppskotinum er ætlanin soleiðis at víðka um heimildarøkið hjá Kærustovninum til eisini at fevna um avgerðir eftir hesi nýggju lóggávu.

Meting er tó ikki gjørd av, hvussu nógvar av hesum avgerðum væntandi verða kærdar og harvið, hvussu uppskotið økir um arbeiðsbyrðuna á Kærustovninum. Uppskotið tekur soleiðis ikki hædd fyri fíggjarligum avleiðingunum fyri Kærustovnin.

Tað framgongur av uppskotinum, at tað er trupult at meta um talið av umsøkjarum. Ivaleyst er enn truplari at meta um, hvussu nógv fáa noktandi svar og hvussu nógv av hesum velja at kæra. Eitt tal millum 1000-1200 sum fara at fáa leigustuðul, verður tó brúkt í uppskotinum til at meta um, hvussu stór arbeiðsbyrðan á Almannaverkinum verður av uppskotinum. Verður útgangsstøði tikið í hesum sama tali, kundi ein varlig meting verið, at eini 20 mál verða kærd árliga. Út frá hesum verður mett, at árligi kostnaðurin fyri viðgerð av kærum í sambandi við uppskot til løgtingslóg um leigustuðul er kr. 200.000.

Føroya Kærustovnur

Heitt verður tí á Almanna- og heilsumálaráðið um at taka hædd fyri øktari arbeiðsbyrðu á Kærustovninum, tá fíggjarligu avleiðingarnar av uppskotinum verða gjørdar upp.

Vinarliga

Føroya Kærustovnur

Anja Hovgaard, stjóri